# Eik Banki má bjargast

**Eik Banki er í brennideplinum. Leiðslan í bankanum er farin frá, kursurin er rapaður niður, og Eik Banki skal bjargast við nýggjum kapitali.**

Eyðun Klakstein

Fíggjareftirlitið hevur framskundað eitt eftirlit av Eik Banka og Eik Bank Danmark, og avleiðingin av hesum eftirliti er, at Fíggjareftirlitið fer at krevja størri niðurskrivingar og økt solvenskrav frá Eik bankunum.

Í eini fráboðan frá Eik Banka í morgun verður sagt, at enn er ikki greitt, hvussu stórt hetta krav verður, men at talan kann verða um eina munandi upphædd. Roknað verður við, at kravið verður greitt í kvøld ella í morgin, og at bankin so fær eina freist til fáa nýggja kapitalin til vega, so samtakið kann bjargast.

– Vit vita ikki enn, hvussu stórt kravið verður, men vit rokna ikki við, at tað verður nakar trupulleiki at skaffa pengarnar, sum skulu til, sigur Odd Bjellvåg, sum er nýggjur nevndarformaður í Eik Banka.

TF Holding sigur seg vera sinnað at seta 400 milliónir krónur í Eik Banka, men tað er undir ávísum treytum – millum annað at Eik Banki ikki heldur fram við virkseminum í Danmark.

Eisini hevur Eik Banki biðið landsstýrið um at verða við til at endurreisa bankan. Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, segði fyrrapartin, at hann hevur ongar viðmerking til málið í morgun.

Eik Banki sigur, at pengarnir, sum fólk hava standandi í Eik Banka, eru tryggir, tí teir eru umfataðir av óavmarkaðari statstrygd.

Rembingarnar í Eik hava við sær, at leiðslan er farin frá. Báðir stjórarnir, Marner Jacobsen og Bjarn Olsen, eru farnir heim, og Bogi Bendtsen er settur sum nýggjur stjóri.

Nevndarformaðurin. Frithleif Olsen, er farin frá og er nú vanligur nevndarlimur. Fyrrverandi næstformaðurin, Odd Bjellvåg, er nýggjur nevndarformaður, og samstundis er Tórmund A. Joensen blivin næstformaður.

*eydun@sosialurin.fo*

# STJÓRARNIR FÁA GYLT LÓGVATAK

**Lat meg undirstrika, at stjórarnir ikki eru koyrdir, men eru farnir frá eftir egnum ynski og eisini eftir nevndarinar ynski. Annars havi eg ongar viðmerkingar til fráfaringarviðbót, sigur Odd Bjellvåg, nýggjur nevndarformaður**




*Gunnar í Liða og Odd Bjellvåg á tíðindafundi í Eik Banka í morgun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Bogi burturstaddur

Leo Poulsen

Tað var eingin stjóri at fáa eyga á til tíðindafundin hjá Eik Banka í morgun. Minni gjørdist undranin ikki, tá Odd Bjellvåg einki svar hevði til, hví nýggi stjórin ikki var til staðar.

Hetta vísti seg kortini at vera in kiksari hjá Odd Bjellvåg, sum hevði yvirhoyrt spurningin. Bogi Bendtsen er nevniliga staddur í Danmark í arbeiðsørindum, og kundi av teirri orsøk ikki vera við á tíðindafundinum.

Eik Banki sigur, at aftrat sær hevur Bogi Bendtsen ein leiðslubólk við Finn Danberg, undirstjóra og fíggjarleiðara, og Øssur Skeel Nolsøe, økisleiðara fyri Eikdeildirnar í Suðurstreym.



*Bogi Bendtsen, nýggjur stjóri í Eik Banka*

Leo Poulsen

– Hendan støðan er komin heilt óvart á.

Tað staðfesti nýggi nevndarformaðurin í Eik Banka, Odd Bjellvåg.

Seinastu vikurnar hevur fíggjareftirlitið gjøgnumgingið fíggjarstøðuna í bankanum, og úrslitið er, at bankin verður kravdur eftir nógv fleiri avsetingum, enn gjørdar eru í roknskapinum.

– Vit vita ikki endaligu tølini enn, og tí ber heldur ikki til at siga, hvussu nógvan pening bankanum tørvar fyri at lúka treytirnar hjá fíggjareftirlitinum, sigur Odd Bjellvåg.

Nýggi nevndarformaðurin leggur stóran dent á, at teir báðir stjórarnir, Marner Jacobsen og Bjarni Olsen, ikki eru sagdir úr starvi, men eru farnir eftir egnum ynski.

– Vit hava tingað okkum fram til eina avtalu við stjórarnar, men eg fari ikki at nevna nøkur tøl, tí her er talan um privat viðurskifti, sigur Odd Bjellvåg.

Hann leggur tó aftrat, at hetta er ikki meiri privat enn so, at tølini fara at ganga aftur í ársroknskapinum.

Tað gevur onga meining at gita um tølini, men við útgangsstøði í árslønini og teirri upphædd, ið stjórin í Norðoya Sparikassa fekk í fráfaringarviðbót má gangast út frá, at eisini Marner Jacobsen og Bjarni Olsen hava fingið eitt gylt lógvatak.

– Teir hava fingið eina upphædd, sum nevndin metti nøktandi, staðfesti Odd Bjellvåg.

Við í skjáttuni til tíðindafundin hevði nýggi nevndarformaðurin eina tilsøgn frá TF Holding upp á 400 milliónir í nýggjum innskoti, tó við ávísum treytum.

– Hetta hevur alt at siga hjá okkum, og hetta ger, at vit hava sera góðar vónir um at reisa tann pening, ið verður neyðugur, sigur Odd Bjellvåg, nýggjur nevndarformaður í Eik Banka.